# Javnbjóðis samstarvsavtala millum kommunurnar við Skálafjørðin um økistænastuna.

**Javnbjóðis samstarvsavtala millum Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunu**

**Samstarvsavtalan hjá Skálafjarðarsamstarvinum um Økistænastuna 9.des. 2014**

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ........ 2

§ 1. Skipan, navn, heimstaður og endamál. ........ 3

§ 2. Avgerðar- og setanarmynduleikin. ........ 3

§ 3. Val av stýri og stýrisfundir. ........ 3

§ 5. Ognarviðurskifti ........ 4

§ 6. Fíggjar –og íløguviðurskifti ........ 5

§ 7. Skyldur hjá samstarvskommununum ........ 6

§ 8. Daglig umsiting og leiðsla ........ 6

§ 9. Visitatión. ........ 7

§ 10. Eftirlit. ........ 7

§ 11 Starvsfólkaviðurskifti ........ 7

# Samstarvsavtalan hjá Skálafjarðarsamstarvinum

## § 1. Skipan, navn, heimstaður og endamál.

Stk. 1 Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunur hava valt at skipa seg í eitt javnbjóðis samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Endamálið hjá samstarvinum er at umsita heimatænastu og øll øki av eldrarøktini í Runavíkar-, Nes – og Sjóvar kommunum og tryggja, at *Løgtingslóg nr.20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (hereftir ll.20); Løgtingslóg nr.19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (hereftir ll.19)* og *Løgtingslóg nr. 31 frá 14. Apríl 2014 um ávís starvsfólkaviðurskifti, tá heimatænastan, eldrarøktin, v.m. verður løgd til kommunur at umsita. (hereftir ll.31)* verða hildnar.

Stk. 2 Kommunurnar hava í semju gjørt avtalu um at lata uppgávuna at røkja heimatænastu, eldrarøkt v.m. yvir til javnbjóðis samstarvið.

Stk. 3 Navn samstarvsins er "Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum". Heimstaðurin hjá samstarvinum er Runavík, sí § 8 í hesi samstarvsavtalu.

## § 2. Avgerðar- og setanarmynduleikin.

Stk. 1 Samstarvskommunurnar velja eitt stýri at fyrisita samstarvið samb. ll.20 § 7 stk. 1, 2. pkt. Stýrið hevur avgerðarrættin hjá samstarvinum og tekur avgerðir kommunurnar vegna. *(Sí ll.20 §7 stk. 9, pkt. 8)*

Stk. 2 Stýrið er setanarmyndugleiki í samstarvinum samb. ll.20 §7 stk. 9, pkt. 9. Stýrið kann seta leiðaran fyri samstarvið og loysa leiðaran úr starvi. Um eingin leiðari er settur, hevur stýrisformaðurin leiðsluna av samstarvinum.

Stk. 3 Leiðarin í samstarvinum kann vegna stýrið seta fólk í starv og loysa fólk úr starvið, eftir galdandi lógum og sáttmálum á økinum.

## § 3. Val av stýri og stýrisfundir.

Stk. 1 Í stýrið verða valdir í minsta lagi 5 limir. Hvør kommuna fær 1 lim og 1 varalim. Borgarstjórin er fyrstvaldi limur. Í kommunum við fleiri enn 1 limi verða valdir 2 varalimir, fyrsti og annar varalimur. Varalimirnir verða valdir millum kommunustýrislimirnar.

Stk. 2 Kommunur við oman fyri 1000 íbúgvum við ársbyrjan í valárinum fáa 1 lim afturat pr. 1000 íbúgvar. Hesir verða valdir millum kommunustýrislimirnar.

Stk. 3 Í kommunusamstørvum, sum fáa færri enn 5 stýrislimir, verður vantandi talið av limum við varalimum tillutað samstarvandi kommununum lutfalsliga eftir fólkatalinum. Hesir limir vera valdir millum kommunustýrislimirnar.

Stk. 4 Stýrið verður valt eftir kommunuval fyri valskeiðið, sum kommunustýrið situr. Stýrið verður valt fyrstu ferð sum skjótast eftir, at samstarvið er góðkent og situr valskeiðið út. *(Sí ll.20 § 7 stk. 4.)*

Stk. 5 Stýrið hevur regluligan fund í hvønn ársfjórðing, sum verða ásettir fyri eitt ár í senn. Stýrið kann hava eyka fund eftir tørvi, ella eftir áheitan frá einum stýrislimi ella leiðaranum í samstarvinum.

Stk. 6 Stýrisfundir eru viðtøkuførir, tá ið allar kommunurnar í samstarvinum eru umboðaðar og í minsta lagi 2/3 av stýrislimunum eru á fundi. Er fyrsti fundur ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur um helvtin av stýrislimunum eru á fundi.

Stk. 7 Miðað verður ímóti, at avgerðir hjá stýrinum verða tiknar í semju. Annars verða avgerðir í stýrinum avgjørdar við 2/3 meiriluta av greiddum atkvøðum.

Stk. 8 Sum minnilutaverja kann 1/3 av stýrislimunum krevja at mál vera løgd fyri einstøku kommunustýrini til hoyringar, áðrenn avgerð verður tikin í stýrinum.

Stk. 9 Leiðarin í samstarvinum er skrivari á stýrisfundunum. Leiðarin hevur ikki atkvøðurætt.

Stk. 10 Til stýrisfundirnar skal stýrisformaðurin skipa fyri, at gerðabókin verður førd eftir ásetingunum í fundarskipanini, sí *"Fylgiskjalið til javnbjóðis samstarvsavtaluna millum kommunurnar við Skálafjørðin um økistænastuna"*, hereftir nevnt fylgiskjalið.

Stk. 11 Tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. skula fremjast sum hava ávirkan á tænastuna í økinum, skal stýrið áðrenn avgerð verður tikin beina málið til Borgaraumboðanina til hoyringar, sí ll.19 § 6. Borgaraumboðanin hevur hoyringsrætt, men ikki avgerðarrætt, sí § 7 stk. 2 í hesi samstarvsavtalu.

Stk. 12 Stýrið ger sjálvt starvsskipan sína.

Stk. 13 Stýrið fær samsýning sambært galdandi reglum um samsýning til kommunustýrislimir. *(Sí ll. 20 § 7 stk. 5)*

## § 5. Ognarviðurskifti

Stk. 1 Runavíkar, Nes – og Sjóvar kommuna avhenda sínar ognir innan eldraøkið til Skálafjarðarsamstarvið at eiga og reka. Kommunurnar leggja lutfalsliga líka nógv virðir inn í samstarvið, í mun til fólkatalið í kommununum pr. 01.01.14.

Ognirnar vera avhendaðar Skálafjarðarsamstarvinum tann 01.01.15 í mun til fólkatalið pr. 01.01.2014.

Skálafjarðarsamstarvið kemur pr. 1 januar 2015 at eiga og reka hesar ognir:

- Eysturoyar røktar- og ellisheim, í Runavík.
- Heimið á Mýrunum, í Runavík
- Eldrasambýlið "Vesturskin", á Toftum.
- Eldrasambýlið "Sambýlið á Skála", á Skála.
- Eldrasambýlið á Strondum, sum stendur í gerð.

Stk. 2 Kommuna kann ikki ganga út úr samstarvinum uttan so, at hetta er skrivliga fráboðað við eitt ára freist frá 1. januar og hetta er góðkent av avvarðandi Landsstýrisfólki.

Stk. 3 Um kommuna tekur seg úr samstarvinum, fella ognirnar aftur til hesa kommunu samsvarandi prístalsviðgjørdum innskoti tann 1. januar í tí árinunum, ið kommunan tekur seg úr.

Stk. 4 Um samstarvið í síni heild heldur uppat, vera ognirnar at fella aftur til kommunurnar á sama hátt sum í stk. 3.

## § 6. Fíggjar -og íløguviðurskifti

Stk. 1 Raksturin hjá samstarvinum verður fíggjaður av kommununum, har útreiðslurnar verða býttar samsvarandi tali av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri *(sí ll.20 § 10).*

Stk. 2 Allar nýíløgur, umbyggingar og størri umvælingar verða framdar av Skálafjarðarsamstarvinum og útreiðslurnar býttar samstarvandi tali av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri (sí ll.20 §10).

Annað viðlíkahald verður somuleiðis framt av Skálafjarðarsamstarvinum, har útreiðslurnar verða býttar samsvarandi tali av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri *(sí ll.20 § 10).*

Stk. 3 Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Formaðurin skal fyri 1. september leggja uppskot til fíggjarætlan og íløguætlan fyri stýrið.

Stk. 4 Fíggjarætlanin skal umframt eina rakstrarætlan yvir inntøkur og útreiðslur eisini vísa eina meting av íløgum hjá samstarvinum og møguligari lántøku *(ll.20 § 7 stk. 9., pkt. 5).*

Stk. 5 Stýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir:

1. Viðgerð skal vera fyri 1. okt. soleiðis, at avleidda gjaldið hjá kommununum í samstarvinum kann takast við í fíggjarætlanarviðgerðina hjá avvarðandi bý- og bygdaráðum
2. Fíggjarætlanin og íløguætlanin skula vera endaliga samtyktar á stýrisfundi í desember, eftir at kommunurnar í samstarvinum hava samtykt sínar fíggjarætlanir.

Stk. 6 Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan at neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan, treytað av at fígging fæst hjá kommununum.

Stk. 7 Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum *(Sí II.20 § 7 stk. 8)*.

Stk. 8 Fíggjarætlan og íløguætlan hjá samstarvinum skal leggjast fyri avvarðandi bý- og bygdaráðum til hoyringar.

Stk. 9 Samstarvið hevur sjálvstøðugan roknskap, og fylgir ásetingunum í kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununa o.tíl.

## § 7. Skyldur hjá samstarvskommununum

Stk. 1 Kommunurnar ábyrgdast fyri skyldurnar hjá samstarvinum yvirfyri viðskiftafólki og starvsfólkum, ein fyri allar og allar fyri eina, og sínamillum í mun til talið av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri.

Stk. 2 Samstarvskommunurnar skula seta á stovn eina felags Borgaraumboðan at umboða áhugamál borgaranna í samstarvsøkinum. Borgaraumboðanin skal mannast av fólki úr øllum kommununum, sí fylgiskjal. Borgaraumboðanin skal hoyrast av stýrinum, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum, sí II.19 § 6 stk. Borgaraumboðanin hevur hoyringsrætt, men ikki avgerðarrætt.

## § 8. Daglig umsiting og leiðsla

Stk. 1 Dagliga umsitingin er staðsett í Runavík, miðsavnað í hølum hjá samstarvinum, óheft av umsitingunum hjá kommununum. Eftir nærri samskipan við leiðaran veitir umsitingin allar neyðugar umsitingarligar tænastur til samstarvið.

Stk. 2 Leiðslubygnaðurin er skipaður við leiðaranum ovast, ið vísir til stýri samstarvsins. Leiðarin hevur heimild at undirskriva fyri samstarvið.

Stk. 3 Leiðarin hevur ábyrgd av umsitingini av samstarvinum. Leiðarin hevur sostatt ábyrgd av teim fakligu, fíggjarligu, umsitingarligu og starvsfólkaligu viðurskiftunum í samstarvinum.

Stk. 4 Undir leiðaranum er høvuðsskrivstovan, sum er fyrisiting felagsins, við ábyrgd av m.a. umsiting, fíggjarviðurskiftum og KT.

Stk. 5 Samstarvið nýtir KT-tænasturnar, sum landið bjóðar og verða viðurskiftini viðvíkjandi roknskapi og KT-tænastum avtalað nærri í : "Sáttmála um tænastustig av roknskapar-og kt-tænastum millum landið og samstarvið", sí SLA.

Stk. 6 Skrivstovan virkar sum felags hurð og inngongd hjá borgarunum til heimatænasturnar og eldrarøktina. Borgarin skal sostatt leita sær hjálp á einum og sama stað, óansæð hvør tørvurin er og óansæð hvør skal veita borgaranum tænastuna.

Stk. 7 Leiðarin og deildarleiðararnir hava, hvør á sínum øki, skyldu at ansa eftir, at fyrisiting og umsiting av virkseminum hjá samstarvinum verður gjørd á besta hátt og hava teir/tey ábyrgd av, at gjørt verður eftir teimum lógum og reglum, ið hitt almenna fyrisetur.

Stk. 8 Samstarvskommunurnar binda seg til at lata leiðaran og umsitingina taka sær av dagliga rakstrinum av samstarvinum, uttan politiskt uppíbland. Hendan regla skal tryggja, at avgerðir um tilboð og tænastur til eina og hvørja tíð eru grundaðar á fakliga tørvsmeting og veittar út frá regluni um, at tann sum hevur størstan tørvin, fyrst fær hjálp *(Sí II.19 § 3 stk. 1 og § 5 stk. 2-3).*

## § 9. Visitatión.

Stk. 1 Visitatiónin verður skipað við eini fakligari visitatións- og upptøkunevnd, sum tekur sær av visitatiónini av øllum tænastum hjá samstarvinum, sí fylgiskjal.

## § 10. Eftirlit.

Stk. 1 Eftirlitið verður skipað í millumkommunalum samstarvi eftir kunngerð samb. II.19 § 19, stk.3.

## § 11 Starvsfólkaviðurskifti

Stk. 1 Eftir avtalu við samstarvið Eysturkommuna/Fuglafjørður, yvirtaka vit hesi starvsfólk úr Heimatænastuni Øki 3, pr. 1 januar 2015:

- Eldrasambýlinum "Vesturskin": Øll 19 starvsfólk, samsvarandi 12,8 ársverk
- Útibólkur á Eystara armi: Øll 9 starvsfólk, samsvarandi 6,6 ársverk
- "Eldrasambýlið á Skála": Øll 12 starvsfólk, samsvarandi 7,7 ársverk
- Útibólkur á Vestara armi: Øll 11 starvsfólk, samsvarandi 6,3 ársverk
- Fysio-og Ergoterapeutar: Øll 3 starvsfólk, samsvarandi 2,5 ársverk
- Verandi leiðara: Vit yvirtaka verandi leiðara, samsvarandi 1 ársverk
- Fakligur samskipari: Vit yvirtaka fakliga samskiparan, samsvarandi 1 ársverk
- Sjúkrarøktarfrøðingabólkurin: Vit yvirtaka starvsfólk samsvarandi 5,1 ársverk.
- Reingerð á Økisskrivstovuni: Vit yvirtaka starvsfólkið, samsvarandi 0,1 ársverk

Stk 2. Samstarvið yvirtekur øll starvsfólk atknýtt "Eysturoyar røktar- og ellisheim" pr. 1. januar 2015.

Staður: Strendur Dagfesting: 15 des. 2014

| | | |
|---|---|---|
| Magnus Rasmussen<br>borgarstjóri,<br>Runavíkar kommuna | Jóhannus Danielsen<br>borgarstjóri,<br>Nes kommuna | Artur Johansen<br>borgarstjóri,<br>Sjóvar kommuna |